## Arthur Johansen borgarstjóri á Strondum



Nývalda kommunustýrið á Strondum hevur nú skipað seg við Arthuri Johansen (myndin) sum borgarstjóra. Hann fekk eisini flestar atkvøður á valinum týsdagin. Varaborgarstjóri er Pole J. Hansen. Borgarstjórin í Sjóvar kommunu er eisini formaður í fíggjarnevndini. Hinir nevndirnar skipaðu seg soleiðis við formonnum: Tekniska nevnd: Tummas Eli H. Joensen; Trivnaðarnevnd: Bettina Christiansen; Vinnunevnd: Sonni Johansen; Bygginevnd: Pól Jákup Poulsen.

## Felags samgonga í Sørvági

Sune Jacobsen verður nýggjur borgarstjóri í Sørvágs kommunu og Jóhan F. á Ørg varaborgarstjóri. Vágaportalurin skrivar, at bygdaráðið skipaði seg soleiðis á fundi í gjárkvøldið. Við valið vóru tríggir listar. Størstu gjørdist listi B, og sambært einum av bygdaráðslimunum úr hesum listanum, Herálvi Jacobsen eru tey vælnøgd við býtið av nevndarsessum, hóast bæði formaðurin og næstformaðurin eru úr lista A, skrivar Vágaportalurin.

# Tríggir gamlir tónleikarar heiðraðir

**Føroya musikkskúlalærarafelag heiðraði í dag trimum av teimum, ið hava verið við til at gera symfoniorkestrið til tað tað er í dag. Alex Sólstein, Bogi Lützen og Kanny Sambleben fingu lógvabrestir og gávur**

HEIÐRAN
*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*

Í ár eru 25 ár síðan Føroya Symfoniorkestur varð sett á stovn og í hesum sambandi vóru tveir klaksvíksingar, Alex Sólstein og Bogi Lützen, ið vóru við til at fáa fyrstu konsertina upp á beinini, og Kanny Sambleben úr Noreg, ið var annar av stigtakarunum til stovnanina, heiðraðir.

Tað var í sambandi við at Norðurlandahúsið lat upp, at hugskotið til at stovna eitt symfoni orkestur kom. Kanny Sambleben og Magne Synnevåg vóru teir, ið upprunaliga komu við hugskotinum. Magne Synnevåg býr í dag í heimlandinum Noreg. Kanny Sambleben greiddi frá hvussu hugskotið var komið til teirra,

- Norðurlandahúsið var júst latið upp, og tað var eitt upplagt stað at spæla stórar konsertir. Meðan vit koyrdu ein dagin, kom hugskotið til okkum báðar, og vit avgjørdu at royna at finna tónleikarar.

**Konsert:**
Føroya Symfoniorkestur hevur jóla- og familjukonsertir 6. og 7. desember. Fyrra konsertin verður í Runavík og seinna í Havn.
Á skránni verður hugnaligur jólatónleikur við orkestrinum og eitt kór á 150 børn verður eisini at hoyra.

### Komið langa leið

Teir báðir Bogi Lützen og Alex Sólstein vórðu heiðraðir fyri dyggan, trúvan og áhaldandi stuðul til orkesturvirksemið, báðir hava verið við frá tí fyrstu konsertini, ið symfoniorkestrið spældi. Fyrstu konsertina lat Bogi Lützen upp og stjórnaði ein part av.

- Tað hevur verið ein øgilig broyting í orkestrinum, síðan tað var stovnað.



*Alex Sólstein (vm), Kanny Sambleben (m) og Bogi Lützen (hm) vóru í dag heiðraðir fyri teirra arbeiði í og við Føroya Symfoniorkestri*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tað er farið frá at vera eitt amatør orkestur, til at vera á heilt høgum støði í dag. Danskir tónleikarar hava verið við til hesa menningina, sigur hann.

Bogi Lützen dirigeraði orkestrinum í nøkur ár, síðan tað hava onnur verið á tí staðnum. Av teimum umleið 77 konsertunum, ið Føroya Symfoniorkestur hevur spælt stjórnaði hann fimm tær fyrstu.

Hann metir, at gjøgnum tíðirnar hevur symfoniorkestrið havt stóran týdning fyri tónleikalívið í Føroyum og fyri lærararnar á musikkskúlanum.

- At lærararnir sleppa at spæla og vera fyrimyndir hjá næmingunum, hevur stóran týdning og er stuttligt fyri teir, tá næmingarnir leggja merki til teir, sigur Bogi Lützen.

Hansara ynski um framtíðina hjá orkestrinum er, at tað skuldi gerast ein partur av arbeiðinum hjá musikkskúlalærarum, soleiðis at teir eru sjálvskrivaðir inn í orkestrið, við starvssetan.

# - Havi tænt mína tíð

**Sunleif Rasmussen stillaði ikki upp til seinasta nevndarval hjá Føroya Musikkskúlalærarafelag. Hann hevur sitið í nevndini í sjey ár og kundi vísa á nógv tung mál, ið hava verið uppi og vent**

TÓNLEIKUR
*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*

Eftir at hava sitið í nevndini í Føroya Musikkskúlalærarafelag í sjey ár, metir Sunleif Rasmussen seg hava tænt sína tíð. Hann stillaði ikki upp til seinasta nevndarval og nýggjur limur er Sámal Petersen.

Sunleif Rasmussen legði sostatt frá sær við góðari samvitsku, tí hann hevur barst við fleiri tung mál,

- Í 2004 gloymdi Mentamálaráðið lønarhækkanina á fíggjarætlanini, so tað var upp á tal at koyra lærarar fyri at fáa endarnar at røkka saman, men hetta varð av ongum, tí tað eydnaðist okkum at savna 8.000 undirskriftir uppá lítla og onga tíð, greiðir hann frá.

Árið eftir í 2005 kom sokallaða »Tímapengamálið« fram. Lærararnir fingu pening fyri at ferðast millum skúlarnar, og tað varð avgjørt av Mentamálaráðnum at strika hesar pengar. Orsøkin var, at ávísir lærarar misnýttu skipanina, men hesir starvast ikki í Føroyum longur, leggur Sunleif Rasmussen afturat. Málið hevur verið uppi og vent í heilum síðan tað kom fram, tí Musikklærarafelagið hevur noktað at skriva undir sáttmálan, ið ikki longur veitir tímapengar fyri ferðing.



*Sunleif Rasmussen hevur lagt sín nevndarsess og formanssess frá sær, tí hann metir at hann hevur tænt sína tíð*
*Mynd: Jesn Kristian Vang*

- Men fyri góðum hálvum ári síðan varð málið skotið fyri fasta gerðarættin og samstundis skrivaði eg eitt bræv til til táverandi landstýrismann í fíggjarmálum. Hvat tað var sum riggaði, veit eg ikki, men felagið varð kallað inn á fund. Eitt tvey ára gamalt uppskot varð lagt fram, og nú er sáttmálin undirskrivaður, sum gevur lærarunum avspáking ístaðin fyri pening fyri at ferðast, greiðir Sunleif Rasmussen frá.

- Hetta eru tvey mál, har Mentamálaráðið, ið eg vildi mett, ynskir tað besta fyri musikkskúlalærarar, hevur nýtt miðaldrar framferðarháttir at forða fyri at virksemið skal rigga. Eg vóni at hetta ikki endurtekur seg, sigur Sunleif Rasmussen at enda.